# 8 spurningar um jól

## Bjørt Samuelsen



***Hvat er tað besta við jólum?***
Tætta samveran við børnunum, og at familjan savnast. Miðbýurin í Havn, jólakonsertir, angin av mandarinum og gløgg ... og løtan í kirkjuni jólaaftan, sum er eitt "must".

***Hvat er tað keðiligasta við jólum?***
Tað dapra gerst enn daprari. Tey sum hava tað ringt, fáa tað enn verri á jólum. Og flest okkara hava líkasum ikki stundir, tí vit eru mitt í materialistiska rotturesinum.

***Hvussu helt tú jól sum barn?***
Hjá ommu og abba í Tróndargøtu ella í barndómsheiminum á Marknagilsvegnum, nú Dánjalstrøð.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
Í Herning. Har eiga børnini 4 systkinabørn, og omman og abbin koma úr Kolding. Fyrstadag savnast vit - familjan telur 21 - í Århus. Tað plagar at vera sera lívligt og hugnaligt.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
Havi langt síðani fingið ov mikið av tí, royni tí ikki at resa ov nógv. Í ár eru flestu gávurnar keyptar, og eftir er bert at gera marcipan og baka eitt sindur. Havi ongar ambitiónir um sjey sløg! Kanska fer tað í ár at eydnast at slappa av og bar hugna okkum í desember?

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
Ja, javnan. Fyrstu ferð í París, tá eg var 19. Vit vóru fimm gentur, sum pyntaðu eina urtapottaplantu sum jólatræ, roykt cigar aftaná døgurðan og fóru til midnáttargudstænastu í Sacré-Cæur á Montmartre. Við familjuni havi eg fleiri ferðir hildið jól í Norra. Ta einu ferðina í einari smáttu í kavakløddum fjøllum. Vit feldu okkara egna jólatræ, eldurin brann á eldstaðnum og 10 míl vóru til nærmasta handil. Tað vóru sonn ævintýrjól!

***Keypir tú sjálv/ur tínar jólagávur?***
Ja, eg keypi fleiri enn 30 jólagávur. Ein uppgáva eg væl kundi hugsað mær at útlicitera!

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
Bøkur eru altíð ovast á ynskilistanum. Føroyskar og enskar. Havi eina tigandi avtalu við pápi mín, um at geva hvørjum øðrum bøkur. Annars ein nýggjan bil, men tað er vist langt omanfyri loyvda jólagávuprísklassa :)


























